Búskapur og vinna:

## Prísfundur

Umboð fyri fiskimálaráðið, uttanríkisráðið og alivinnuna í Noregi fara á fundi í dag at tosa um, hvussu tær komandi samráðingarnar við ES um laksaútflutningin skulu leggjast til rættis. Frammanundan er fráboðað, at málið er at sleppa av við regluna um minstaprís á laksi til ES-marknaðin.

Sambært skipanini kunnu norðmenn ikki selja laks til ES fyri minni enn 26 norskar krónur kilo, og tað hevur havt stórar trupulleikar við sær, tí minstaprísurin hevur gjørt, at norski laksurin má dvína fyri laksi úr Føroyum, Skotlandi, Írlandi og Kili, sum ikki er umfataður av minstaprísskipanini.

## Skjót vend

Amerikanski tjóðbankastjórin, Alan Greenspan, sigur, at vend er komin í amerikanska búskapin eftir yvirgangsatsóknirnar tann 11. september í fjør. Sjálvur heldur hann, at tað hevur gingið nógv skjótari at fáa vend í, at nakar hevði væntað. Bankastjórin sigur, at tað er teirri framkomnu tøknini fyri at takka, at vendin kom so skjótt.

Samstundis ávarar hann um, at framgongdin fer at taka longri tíð, enn vit hava vrið von við aftan á krepputíðir.

## Leggja saman

Tvey av teimum størstu arbeiðsgevarafeløgunum í Noregi ætla at leggja saman. Talan er um Næringslivets Hovedorganisasjon og Handels- og Servicenæringens Hovedorganisasjon. Gonst eftir ætlanini, verða tey bæði feløgini løgd saman 1. januar næsta ár. Endamálið við at leggja saman er at gera vinnuna sterkari, so hon kann tala við einari rødd.

Í NH O eru einar 16.000 handverks-, ídnaðar- og tænastufyritøkur, sum hava umleið 450.000 arbeiðspláss. HSH hevur umleið 14.600 fyritøkur sum limir, og hjá teimum eru arbeiðsplássini umleið 250.000.

UTTAN ÚR HEIMI

# 20 flogvallarstarvsfólk tikin

*Eitt flogfar hjá United Airlines í ferð við at seta seg í Logan-floghavnini í Boston*
*Mynd: Reuters*



**Amerikansku myndugleikarnir hava tikið 20 starvsfólk í Logan-floghavnini í Boston.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Handtøkurnar hava vakt stóran ans, tí tvey av flogførunum, sum vórðu rænd og nýtt í yvirgangsatsóknunum tann 11. september í fjør, fóru á flog úr Logan-floghavnini.

- Vit hava tikið 20 fólk, sum arbeiddu fyri ymisk feløg her í floghavnini, segði talskvinnan hjá ákæruvaldinum í Boston í gjár. Hon vildi ikki upplýsa, hví fólkini vóru tikin, men tíðindastovan AP skrivaði, at seks av teimum tiknu høvdu starvast í trygdareftirlitinum í floghavnini.

Ein útvarpsstøð visti í gjár at siga, at tey tiknu høvdu m. a. nýtt falsað samleikaprógv.

Í desember tók amerikanska løgreglan fleiri starvsfólk í floghavnunum í Las Vegas og Salt Lake City, og nógv teirra hava seinni mist arbeiðið.

# ES-endurskoðanin byrjað

**Arbeiðið at endurskoða ES byrjaði í gjár. Tey trý Norðurlondini, sum eru limir í ES, hava sett sær fyri at stríðast fyri meiri demokratii størri rættindum til tey smáu limalondini**

ES-ENDURSKOÐAN
*Árni Joensen*

Áhugin fyri arbeiðinum hjá teimum útvaldu, sum skulu endurskoða ES, er stórur, og í fronskum sjónvarpi varð dagurin í gjár lýstur sum ein søguligur dagur. Kanska var tað ikki av tilvild, at júst franska sjónvarpið hevði hesa áskoðanina, tí oddamaður í endurskoðanararbeiðinum er fyrrverandi franski forsetin Valery Giscard d'Estaing.

Svenska stjórnin hevur valt varaforsætisráðharran Lenu Hjeml-Wallen at umboða seg í Bruxelles. Hon er ein av teimum næstu medarbeiðarunum hjá Gøran Persson, forsætisráðharra, men hevur boðað frá, at hon stillar ikki uppaftur til valið í heyst. Hetta kann vísa seg at vera ein fyrimunur, tá hon skal taka støðu til tey ymsu uppskotini, men hinvegin kann tað eisini vera ein vansi, tá svensku sosialdemokratarnir skulu taka støðu til ta endaligu endurskoðanina.

Borgarliga danska stjórnin hevur valt at lata seg umboða av Henning Christophersen. Hann er fyrrverandi ES-kommiserur og kennir samveldið út og inn.

Stjórnin í Helsingfors hevur valt eina aðra kós enn hini bæði londini. Stjórnin hevur valt tann unga akademikaran Teiju Tilikainen at umboða seg, og hon er ein av teimum fáu ungu kvinnunum í endurskoðanarráðnum.

Felags fyri tey trý Norðurlondini er, at tey hava sett sær fyri at bøta um demokratiið í ES. Londini bera ótta fyri, at demokratisku skipanirnar verða uppaftur tyngri enn nú, tá tíggju lond í Mið- og Eysturevropa fáa limaskap í næstum.

Samstundis hava bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, og týski samveldiskanslarin, Gerhard Schrøder, lagt fram uppskot um, at ES eigur at verða meiri opið í framtíðini, og at nógv, sum í dag fer fram í tí dulda, skal leggjast fram alment. Uppskotið stendur í einum brævi, sum teir báðir hava sent spanska forsætisráðharranum, Jose Maria Aznar, sum í løtuni er formaður í ES.

### Evropeiski Franklin

Ráðið, sum skal endurskoða ES, hevur ongan avgerðarrætt, og uppskot tess skal viðgerast á einari stjórnarráðstevnu, sum verður í 2004. Tá sleppa tey einstøku limalondini eisini at siga sína hugsan og at bera fram seráhugamál. Kortini er eingin ivi um, at arbeiðið hjá endurskoðanarráðnum er av stórum týdningi, tí uppskotini haðani fara at leggja stórt rýst á ES.

105 politikarar úr teimum 15 ES-londunum og teimum 13 umsøkjaralondunum manna endurskoðanarráðið. Ein nevnd við 12 limum leiðir arbeiðið, og formaður í henni er tann 76 ára gamli Valery Giscard d'Estaing.

Sjálvur er fyrrverandi franski forsetin ikki í iva um, at hann hevur fingið eitt álitisstarv, og í einari samrøðu herfyri sammetti hann seg við sjálvan Benjamin Franklin, sum var ein av teimum leiðandi monnunum í ráðnum, sum í 1780-unum hittist í Philadelphia og har orðaði uppskotið til amerikansku grundlógina.

Giscard hevur ikki sagt, at hann fer at gera sum amerikanska fyrimynd hansara og at orða eina grundlóg fyri ES, men tað er júst hetta, sum sterkar kreftir vilja hava hann at gera.

Um eitt ár skal hann leggja úrslitið fram.

Úr Norðurlondum:

## Verkfall

Felagið hjá donsku sjúkrasystrunum og felagið hjá radiografunum hava boðað frá verkfalli, eftir at samráðingarnar við teir kommunalu arbeiðsgevararnar eru slitnaðar. Verður verkfallið veruleiki, fara umleið 6.000 limir í teimum báðum feløgunum til hús.

Verkfallið kemur í gildi tann 2. apríl, og tað fer at umfata allar sjúkrasytsrarnar við undantak av leiðandi sjúkrasystrum í trimum amtum.

## Ræða fólk

Skandinaviska flogfelagið SAS krevur nú, at løgreglumenninir skulu fjala hondjørnini, tá teir fylgja fangum, sum skulu flytast við flogfari. Flogfelagið vil vera við, at hondjørnini órógva hini ferðafólkini.

Men løgreglan er ikki serliga fegin um kravið hjá SAS. Løgreglan sigur, at flogfeløgini eiga ikki at seta ov strong krøv. Løgreglan sigur, at tað er uppgáva hennara at tryggja, at famngarnir ikki sleppa til rýmingar, og í hesum eru hondjørnini eitt neyðugt amboð.

SAS krevur, at løgreglumenninir skulu vísa fyrilit í floghavnunum, tí nógv ferðafólk verða órógvað, tá tey síggja fólk í hondjørnum.

### Ikki morð

Svensku myndugleikarnir vóru ikki í iva um, at ein 34 ára gomul kvinna, sum varð funnin deyð umborð á einari ferju fyrr í vikuni, var myrd, og tá ferjan kom aftur úr Finnlandi til Svøríkis, varð ein 25 ára gamal maður tikin..

Men í gjár boðaði løgreglan frá, at maðurin var latin leysur, tí sambært læknunum var einki, sum bendi á, at nakar hevði gjørt seg inn á kvinnuna. Tann 34 ára gamla varð funnin á dúrkinum niðriundir.



# Heri Hjelm misti virði fyri 40 milliónir krónur

**– Tað var ein vanlukka fyri nýggja laksavirkið í Vági, at aliringarnir á Trongisvágsfirði slitu mikumorgunin og róku á land. Nú er helvtin av fiskinum, sum skuldi takast í heyst, farin fyri skeytið.**

ÓHAPP
*Áki Bertholdsen*



*Tað eru ikki tríggir mánaðir síðani at Heri Hjelm, høgrumegin og Esmar Simonsen frá Eimskip prátaðu saman í góðum hýri, tá ið nýggja laksavirkið í Vàgi varð tikið í nýtslu. Nú hava báðir verið fyri stórum missi, tí Eimskip flutti nógvan laks fyri Hera Hjelm*

Tað var ein svárur missur fyri alifyritøkuna hjá Hera Hjelm í Vági , tá ið allir teir seks aliringarnir á Trongisvágsfirði fóru í ódnarveðrið mikudagin við yvir 600.000 fiskum í, sum alt fór fyri skeyti.

Laksurin, sum var í ringunum hevði verið búgvin at tikið í heyst.

Heri Hjelm sigur, at við hesi vanlukkuni er næstan helvtin av tí laksinum, sum skuldi takast og arbeiðast í heyst og úteftir, farin fyri skeytið. Nú er bara tað eftir at taka, sum er í ringunum á Hovsfirði.

### Virði fyri 40 milliónir

Saman við norskum samstarvsfeløgum hevur Heri Hjelm júst latið upp nýtt laksavirkið í Vági fyri 70 milliónir krónur og hann dylir ikki fyri, at hetta er ein ógvuliga dyggur smeitur.

– Tað er ein vanlukka fyri laksavirkið í Vági, sigur hann.

Men hann sigur, at tað er ongin vandi fyri virkinum sum so.

– Gongur alt annað væl og tað eydnast við næstu útseting, kann laksur takast aftur longu á heysti næsta ár.

Hann viðgongur tó, at støðan er eitt sindur óviss, tí tað skal fígging til, fyri at kunna seta út.

Tilsamans verður mett, at laksurin, sum fór fyri skeytið í hesi vanlukkuni, hevði havt eitt útflutningsvirði uppá einar 40 milliónir krónur, ella næstan tað.

Men umframt hetta, hevur ein slík vanlukka stórar, avleiddan miss við sær.

Eitt nú skal tað leggjast afturat, tað, sum tað kostar at rudda fjørðin og mølina eftir vanlukkuna, umframt tað, sum ringar og nótir kosta og prísin fyri at endurnýggja alibrúkið og at leggja alt út av nýggjum.

Eisini fyri arbeiðsfólkið er talan um ein ógvuliga dyggan smeit, tí tá í laksavirkið hevur mist helvtina av fiskinum, sum tað átti at taka frá í heyst og úteftir, er tað eisini skilligt, at nógv dagsverk á virkinum eru rokin samstundis.

Og harafturat eru tað eisini nógv onnur, sum missa, eitt nú, flutningsfeløg og tey, sum gera pakkitilfar o.a. Eitt nú høvdu flutningsinntøkurnar verið næstan tríggjar milliónir

### Umhugsa støðuna

Heri Hjelm sigur, at nú verður neyðugt at umhugsa støðuna hjá alibrúkunum á firðunum í Suðuroynni.

– Tað er púra greitt, at vit koma í hvussu so er ikki at leggja ringar útaftur á sama plássi í Froðba, har hesir lógu, sum nú fóru.

Heri Hjelm loyvi ti laling í Froðba, men nú mugu samráðingar takast upp um, akkurát, hvar nýggir ringar skulu leggjast út.

Alibrúki í Froðba lá ikki akkurát har, sum upprunaliga ætlanin var, men plaseringin varð broytt nakað í samráð við kommununa, so at bátarnir skuldi fáa betri siglt. Men tað er so djúpt, har ringarnir lógu, at vit væntaðu ikki at fáa trupulleikar. Men sæð í bakspegililin, kunnu vit ikki annað enn ásannað, at vit hava ligið ov uttarliga.

Heri Hjelm sigur, at tá ið ringar verða lagdir útaftur, mugu teir liggja væl longri inni. Og ístaðin fyri ankar, verður helst neyðugt at hava fast í land og søkk.

– Men samstundis er tað greitt, at tað ber ikki til at ala meiri inni á sjálvum firðunum, tí tað tolir umhvørvið ikki.

Tí verður neyðugt at alibrúkini liggja uttarliga.

– Men tað er heilt greitt, at vit mugu hava nógv betri og sterkari útgerð í øllum alibrúkunum, enn vit hava nú, tí tað slepst ikki undan, at tá ið slík kundi henda í Froðba, fer ivi og óvissa altíð at stinga seg upp um hini alibrúkini eisini og tí verður neyðugt at hyggja eftir øllum alibrúkunum fyri at slíkt ikki skal endurtaka seg.

Hann sigur, at nú er sum skjótast at taka upp eftir vanlukkuna og at fáa tann deyða fiskin og útgerðina burturbeint og at kanna útgerðina fyri at finna tað neyvu orsøkina til, at ringarnir slitu.

Men hann sigur, at tað tykist sum um at bæði ringarnir, nótirnar, og endarnir, sum brúkini vóru fortoyað við, hildu, tað var ikki tí, alibrúkið í Froðba fór.

– Tað er alt, sum bendir á, at tað eru keturnar, sum hava verið millumlið, sum ikki hava hildið, tí ongin av endunum eru slitnaðir. Men alt tað fáa vit alt staðfest, tá ið útgerðin er kannað, sigur Heri Hjelm.

– Men hetta vísir okkum, hvussu týdningarmikið tað er at hugsa um, hvat ein fæst við. Tað eru øgiligar kreftir, ið gera seg galdandi og tað mugu vit hava í huganum, sigur Heri Hjelm.

Men samstundis sigur hann, at brimið mikudagin var eisini eindømi. Smyril hevði tveir tímar norður á Lítlu Dímun, tað plagar at taka hálvan tíma, so tað sigur eitt sindur um umstøðurnar.

# Fór í knús eftir eini lítlari løtu

*Tað var av ringasta brimið mikumorgunin, tá ið alibrúkið hjá Hera Hjelm sleit og fór í knús við 600.000-700.000 fiskum, sum alt fór fyri skeytið. Bæði Grani og Ólavur Hvíti royndu at bjarga, men komu ongnatíð so nær, at teir fingu sett enda á*



**Nattúruvanlukkan, sum rakti alibrúkið hjá Hera Hjelm á Trongisvágsfirði mikudagin,er tann ringasta í føroyskari alivinnu yvirhøvur**

ÓHAPP
*Áki Bertholdsen*

– Hetta var onki minni enn ein vanlukka. Men tað er onki at gera, uttan at halda á.

Heri Hjelm, alari er ikki fallin í fátt, hóast alibrúk hansara hósdagin varð rakt av eini nattúruvanlukku, sum er tann álvarsligasta føroyskari alisøgu nakrantíð.

Í herviligum eystanbrimi mikudagin, slitu allir teir seks aliringarnar, Heri Hjelm hevði liggjandi innanfyri Skarvatanga í Froðba. Ringarnir róku tvørtur um fjørðin og á land á Tjaldavíkshólmi, har alt fór í knús.

Ímillum 600.000 og 700.000 fiskar vóru í ringinum og tað fór alt fyri skeytið. Tað, sum ikki er sloppið úr ringinum fór í briminum sum ringarnir lógu og veltist í briminum og tað eini løtuni var sjógvurin rundanum teir reyður av blóði.

Bæði Ólavur Hvíti og Grani royndi at bjarga ringunum, men teir komu ongantíð so nær at teir fingu enda á.

Nógvir endar hingu afturúr ringunum og vandi var fyri, at skipini skuldi fáa um skrúvuna og Heri Hjelm sigur, at hann legði teimum eina við, at teir máttu ikki seta hvørki manning ella skip í vanda. Sostatt máttu skipini gevast við bjargingarroyndini og tískil fóru ringarnir á land, har alt fór í knús eftir lítlari løtu.

Heri Hjelm sigur, at fiskurin var tryggjaður, men bara fyri tað virðið, tað høvdu beint nú, tvs, at tryggingarupphæddin hækkar alt sum laksurin veksur. Men so skal sjálvábyrgd og annað dragast frá

– Tað ber ikki til at tryggja framleiðsluna og tað virði, sum tað hevði havt tá ið laksurin skuldi takast.

Gunnar í Liða, Tryggingarfelag Føroya:

## Vit upplýsa ikki um tryggingarviðurskifti hjá kundum okkara

SKAÐAVEÐUR
*Vilmund Jacobsen*

Sosialurin royndi hósmorgunin at fáa eina viðmerking frá Tryggingarfelagnum Føroya um støðuna, nú seks aliringar hjá Hera Hjelm mikumorgunin slitu og knústust undir syðra landinum á Trongisvágsfirði.

Vit royndu fyrst at fáa fatur á Virgari Dahl, sum hevur hesi viðurskifti um hendi, men tað eydnaðist ikki, tí hann sat á fundi um málið

### Vit upplýsa ikki

Vit royndu tískil at koma á tal við stjóran, Gunnar í Liða. Tað eydnaðist, men haðani var eingin viðmerking at heinta.

– Vit kunnu ikki upplýsa um tryggingarviðurskifti hjá kundum okkara. Tað er upp til kundan sjálvan at upplýsa um hesi viðurskifti, um hann vil tað. Vilja tit hava nakað at vita um hesi viðurskifti, mugu tit spyrja Hera Hjelm sjálvan.

Hetta var tað einasta, Gunnar í Liða hevði at siga okkum støðuna, nú seksaliringar fullir av laksi fóru í smildur í illveðrinum á Trongisvágsfirði.